

# ERI ERRIN AV GEORG

**Bergitta Hansen, sum er kona nývalda formannin í Føroya Arbeiðarafelag, Georg F. Hansen, heldur, at maðurin tók avgerðina um at taka við formanssessinum, tá hann fór til Havnar á aðalfund**

Vilmund Jacobsen



*Georg og Bergitta Hansen, tá móttøka var í Føroya Arbeiðarafelag seinnapartin fríggjadagin*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Nú Ingeborg Vinther eftir 31 árum sum forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag valdi at gevast, verður tað miðvingurin, Georg F. Hansen, sum kemur at bera stafettina víðari.

Georg, sum er 58 ára gamalur, hevur seinastu 10 árini verið næstformaður í Føroya Arbeiðarafelag.

Á móttøku í hølum Føroya Arbeiðarafelags seinnapartin fríggjadagin, hittu vit konu hansara, Bergittu Hansen.

Bergitta sigur, at hon sjálvandi fer at stuðla manni sínum alt tað, hon er ment, nú hann hevur tikið við leiðsluni í Føroya Arbeiðarafelag.

Spurd, um Georg var í iva um formanssessin, um høvi at gerast formaður stóð honum í boði, heldur Bergitta, at Georg leingi hevur verið í iva.

- Eg haldi ikki, at hann tók endaliga støðu til henda spurning, fyrr enn hann koyrdi til Havnar á aðalfund hósdagin, sigur hon brosandi.

Sjálvur sigur Georg F. Hansen, at kanska var avgerðin ikki tikin júst á veg til Havnar, men hann ásannar, at nú hann hevur tikið av og er valdur til formann í Føroya Arbeiðarafelag, fer hann at ganga upp í hetta álitisstarv við lív og sál.

Vit spurdu eisini Bergittu Hansen, um hon væntar, at maðurin nú verður meiri burtur, enn hann hevur verið.

- Nei, tað dugi eg ikki at siga, tí hann er so sjáldan heima kortini, sigur hon brosandi.

Bergitta Hansen sigur seg vera stolta av manni sínum, nú hann hevur fingið høvi at royna seg sum formann í stóra meginfelagnum hjá so mongum fakfeløgum í Føroyum.

*vilmund@sosialurin.fo*

## *Høsn vurpu - kýr mjólkaðu*

*Í fagrasta várveðri helt Tjóðveldi flokstíng í Haraldssundi um vikuskifti. Tey ungu í flokkinum vóru væl møtt, og elsti áhoyrari var 92 ára gamli, Petur Højgaard úr Saltangará*

Sum vanligt er, tá politiskir flokkar halda aðalfund, landsfund ella flokstíng, eru tað serliga politikarar og tey mest framstandandi í flokkinum, sum brúka mestu talutíðina. Men tað eru eisini løtur, tá orðið er frítt, og høvi er hjá fundarfólki at biðja um orðið og gera viðmerkingar. Á flokstingi hjá Tjóðveldi í Haraldssundi smæddust tey ungu í flokkinum ikki burtur. Fleiri bóru fram greið sjónarmið, sum serliga viðkoma teimum ungu, og her vóru tað serliga útbúgvingarviðurskifti í Føroyum, sum tey settu ljóskastaran á.

Á áhoyraraplássunum vóru bæði ung, tilkomin og eldri, og elsti áhoyrarin var trúgvi tjóðveldismaðurin úr Saltangará, Petur Højgaard, sum í dag er 92 ára gamal. Hann hevur mangan í skrift og talu givið síni sjónarmið til kennar.

Petur Højgaard hevur áður fortalt, hvussu hann upplivdi tað, tá ein meiriluti av teimum føroyingum, sum vóru á vali, atkvøddu fyri loysing hin 14. september í 1946? - Dagin eftir fólkaatkvøðuna, tá Føroyar høvdu valt at loysa, spældu børnini úti sum áður, hønurnar vurpu akkurát tað sama, og kýrnar mjólkaðu minst líka væl sum dagin fyri.

Soleiðis málbar hin nú 92 ára gamli tjóðveldismaðurin seg, tá hann á einum 14. septemberhaldi á Eiði fyri fáum árum síðan segði sína søgu um hesar dagarnar.

*vilmund@sosialurin.fo*

## Í MORGIN

**3/6 °C**



6-11 m/s — 3-8 m/s

Lot til andøvsgul av landsynningi, seinnapartin upp í stívt andøvsgul. Sirm av og á og hitin millum 3 og 6 stig.

## MIKUDAGIN

**6/9 °C**



9-14 m/s — 9-14 m/s

Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og regn ella mjørki, Hitin millum 6 og 9 stig.

## HÓSDAGIN

**7/10 °C**



3-8 m/s — 3-8 m/s

Lot til andøvsgul av suðri og væntandi turt men mjørki í støðum. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, leygarkvøldið minni vindur. Ælingur, men onkur sólglotti og hitin millum 3 og 7 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ



**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 1010 hPa. millum Íslands og Føroya fer í landsynning eystan. Brúgvalagið haðani verður við Føroyar komandi samdøgur.



**Komandi nátt:**
Lágtrýstið á 48N-38V fer í landnyrðing norðan og brúgvaløgini yvir Atlandshavinum koma hendavegin.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 132 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | -9 | **Tromsø** | -1 | **Moskva** | -13 | **Athen** | 14 |
| **Reykjavík** | 8 | **Bergen** | -2 | **Berlin** | -6 | **Beijing** | 11 |
| **Tórshavn** | 7 | **Oslo** | -9 | **Paris** | 3 | **New Dehli** | 20 |
| **Lerwick** | 4 | **Stokkhólm** | -6 | **Madrid** | 15 | **Bangkok** | 32 |
| **Aberdeen** | 7 | **Keypmannah.** | -4 | **Róm** | 11 | **Sydney** | -- |
| **London** | 8 | **Helsinki** | -19 | **Malorca** | 15 | **New York** | 2 |

## VESTFALLSKYRRINDI

19. mars — Mánin næstur jørðini
26. mars — Seinna kvarter
2. apríl — Mánin longst frá jørðini
3. apríl — Tendring

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 28. mars | 03:20 | 15:44 | 02:20 | 14:44 | 02:35 | 14:59 | 05:20 | 17:44 | 06:20 | 18:44 | 01:35 | 13:59 | 00:35 | 12:59 | 03:35 | 15:59 | 04:35 | 16:59 | 03:05 | 15:29 | 04:20 | 16:44 |
| 29. mars | 04:05 | 16:27 | 03:05 | 15:27 | 03:20 | 15:42 | 06:05 | 18:27 | 07:05 | 19:27 | 02:20 | 14:42 | 01:20 | 13:42 | 04:20 | 16:42 | 05:20 | 17:42 | 03:50 | 16:12 | 05:05 | 17:27 |
| 30. mars | 04:47 | 17:07 | 03:47 | 16:07 | 04:02 | 16:22 | 06:47 | 19:07 | 07:47 | 20:07 | 03:02 | 15:22 | 02:02 | 14:22 | 05:02 | 17:22 | 06:02 | 18:22 | 04:32 | 16:52 | 05:47 | 18:07 |
| 31. mars | 05:26 | 17:46 | 04:26 | 16:46 | 04:41 | 17:01 | 07:26 | 19:46 | 08:26 | 20:46 | 03:41 | 16:01 | 02:41 | 15:01 | 05:41 | 18:01 | 06:41 | 19:01 | 05:11 | 17:31 | 06:26 | 18:46 |
| 1. apr | 06:04 | 18:23 | 05:04 | 17:23 | 05:19 | 17:38 | 08:04 | 20:23 | 09:04 | 21:23 | 04:19 | 16:38 | 03:19 | 15:38 | 06:19 | 18:38 | 07:19 | 19:38 | 05:49 | 18:08 | 07:04 | 19:23 |